Fylgiskjal

# Filmshús



Uttanríkis- og vinnumálaráðið, september 2016

Tekning: Bárður Oskarsson

# Innihaldsyvirlit

Filmshús ........ 1
Innihaldsyvirlit ........ 2
Inngangur ........ 3
Filmspolitisk atlit ........ 4
Virksemið í filmshúsinum ........ 4
Bygnaður ........ 6
Manning og umsitingarligar raðfestingar ........ 6
Staðseting og hølistørvur ........ 7
Fíggjarætlan ........ 7
Uppskot til tekst til fíggjarlógaruppskotið 2017 ........ 8
Uppskot til reglugerð fyri Filmshúsið ........ 9
Íslendsku royndirnar ........ 11

# Inngangur

Í politikkinum fyri skapandi vinnur verður mælt til eina røð av átøkum, ið skulu vera við til at menna skapandi vinnur í Føroyum. Átakið, sum landsstýrið hevur givið fyrstu raðfesting, er at seta á stovn eitt filmshús, ið skal stuðla upp undir menningini av føroyskum filmi og føroyskari filmsvinnu.

Á játtanarkørmunum fyri 2017 eru 1 mió. kr. settar av til filmshúsið. Poul Michelsen, landsstýrismaður, hevur sett arbeiðsbólk at gera uppskot til filmshúsið, og í honum eru Oyvindur av Skarði úr Vinnumálaráðnum, Alda Joensen úr Mentamálaráðnum og Pætur M. Dahl frá Klippfisk.

Í arbeiðnum hevur bólkurin havt fundir við niðanfyri nevndu myndugleikar, samstarvspartar og áhugapartar. Arbeiðið tekur støði í álitinum frá Klippfisk um Filmshús frá 2015. Bólkurin hevur eisini verið í Íslandi og kunnað seg við, hvat verður gjørt fyri at menna íslendsku filmsvinnuna. Filmshúsið skal verða við til at savna og samskipa filmsumhvørvið, og arbeitt verður tí fyri at staðseta Filmshúsið í middeplinum fyri føroyska filmsumhvørvinum, helst saman við filmsverkstaðnum Klippfisk og tætt at bæði mentanar- og íverksetaraumhvørvinum í býnum. Í hesum sambandi luttók eisini Jónhild Rasmussen, leiðari í Íverksetarahúsinum Hugskotinum hjá Tórshavnar kommunu, á íslandsferðini.

**Fundir:**

- Klippfisk
- Visit Faroe Islands
- Hugskotið
- Vinnuframi
- Føroysk Filmsfólk
- Marjun Niclasen og Sóley Danielsen
  (um føroyskan dátugrunn við føroyskum filmsfólkum og -fyritøkum)
- Norðurlandahúsið
- Kringvarp Føroya
- Tórshavnar kommuna

**Í Íslandi varð vitjað hjá:**

- Icelandic Film Centre
- Mennta- og menningarmálaráðuneytið (Mentamálaráðið)
- Skapandi Íverksetaradepilin Hlemmur, ið er partur av Nýsköpunarmiðstöð Íslands
- Film in Iceland
- SÍK –Association of Icelandic Film Producers (Hilmar Sigurdsson, former chairman)
- Atlantic Studios, filmsframleiðslukarmar í nýskapanarbygdini Ásbrú í Keflavík

## Filmspolitisk atlit

Saman eru mong átøk og tiltøk við til at mynda filmsumhvørvið í Føroyum í dag og halda grýtuni í kók. Klippfisk, Nollywood, Geytin, limirnir í felagnum Føroysk filmsfólk, áhugafeløg innan film, stuðulsskipanir, Ferðaráðið o.s.fr. Semja er um, at tíðin er komin at taka fetið víðari og formliga skipa filmsøkið, so til ber at byggja víðari og yrkisgera filmslistina.

Vert er at hava í huga, at hóast vit tosa um eina yrkisgerð og film sum vinnu, er grundarlagið í allari filmsframleiðslu mentan og samleiki. "Hollywood can vanish – think culture!" segði íslendskur filmsframleiðari í samrøðu um filmsvinnuna í Íslandi. Hann legði dent á, at filmur skal gerast fyri filmsins skuld, og at man eigur at vera trúgvur móti sær sjálvum. Eins og við øðrum skapandi vinnum ber ikki til at skapa eina lønandi og kappingarføra filmsvinnu, um hon ikki hevur haldgott støði í egnari mentan og skapanarhugi.

Í grannalondunum er vanligt, at stovnar, ið stuðla menning av filmi, filmssentur, filmsinstitutt og líknandi, hoyra undir mentamálaráðini. Við tí vaksandi tilvitinum um búskaparliga týdningin sum skapandi vinnur hava, er tó eisini vorðið vanligt, at ráðini sum varða av mentan, vinnu og útflutningi samstarva um menning og marknaðarføring av skapandi vinnum.

Í Íslandi er ábyrgdin býtt millum bæði menta- og vinnumálaráðini. Mentamálaráðið varðar av Kvikmyndamiðstöð Íslands (Icelandic Film Centre), sum m.a. umsitir filmsgrunnin og arbeiðiðir við útbreiðslu av íslendskum filmum. Vinnumálaráðið umsitir afturberingarskipanina til filmsframleiðslur, ætlaðar altjóða marknaðinum, og Film in Iceland varðar av marknaðarføringini av Íslandi sum filmslandi. Film in Iceland er staðsett undir Íslandsstovu, ið er eitt samstarv millum tað almenna og vinnuna.

Ábyrgdarbýtið millum myndugleikarnar er staðfest í filmslóg og játtanirnar til filmsgerð, filmsfestivalar, Filmssavnið v.m. eru staðfestar í avtalu millum fíggjarmálaráðið, mentamálaráðið og feløgini fyri filmsfólk, filmsleikstjórar og filmsframleiðarar.

Eisini í Føroyum verða skapandi vinnur viðurkendar sum bæði mentanar- og vinnupolitiskt viðkomandi, og lagt er upp til, at bæði Mentamálaráðið, Uttanríkis- og vinnumálaráðið og Fíggjarmálaráðið varða av skipanum filmi at frama. Landsstýrið hevur sett 1 mio. kr. av á játtanarkørmunum fyri 2017 til Filmshús á játtan undir Uttanríkis- og vinnumálaráðnum. Stuðulsjáttanin til filmsgerð verður umsitin av Mentamálaráðnum, og afturberingarskipanin til filmsframleiðslur ætlaðar til útflutnings verður væntandi undir Fíggjarmálaráðnum. Tórshavnar kommuna hevur higartil stuðlað filmsumhvørvinum við kørmum til Filmsverkstaðin Klippfisk, og Norðurlandahúsið hevur tikið stór stig fyri at menna føroyska filmslist sum stigtakarar til fyrrverandi filmsgrunnin og filmsvirðislønina Geytin.

Mælt verður skjótast til ber at smíða lóg um film, ið kann fevna um filmslist og filmsvinnu, harundir filmsjáttanina, filmssavn, afturberingarskipan o.a.

## Virksemið í filmshúsinum

Filmshúsið skal røkja nógvar og fjøltáttaðar uppgávur. Ein høvuðsuppgáva hjá Filmshúsinum er at tryggja framhald í filmsvinnuni, sum í síni náttúru er eyðkend av ótryggleika og skiftandi arbeiðsumstøðum.

Filmshúsið skal savna og miðla vitan um film, filmsvinnuna og filmsførleikar í Føroyum, so at bæði føroyskar og útlendskar filmsframleiðslur kunnu verða settar í verk skjótt og væl. Filmshúsið skal eisini vera við til at meta um umsóknir um afturbering til filmsframleiðslur og soleiðis at tryggja góðskuna av verkætlanum, sum landið velur at stuðla við hesari skipanini.

Filmshúsið skal vera savningarstaður fyri føroyska filmsumhvørvið, miðstøð fyri vitan um film, filmsfakligar førleikar og útgerð. Filmshúsið skal eisini menna altjóða netverk og virka fyri, at føroyskir filmar verða sýndir uttanlands, og Filmshúsið skal eisini verða við til at samskipa og stíla fyri skeiðum og




undirvísing í filmsgerð. Virksemið í Filmshúsinum lagar seg eftir filmsárinum í Føroyum og uttanlands. Í Føroyum fer framleiðslan fyrst og fremst fram um summarið, og skeiðsvirksemi er mest um várið og heystið. Filmsfestivalarnir eru alt árið, men liggja hvør sær rættiliga fast.

Í álitinum frá Klippfisk um Filmshús verður mælt til, at uppgávan at savna og skráseta føroyskar filmar verður ábyrgd hjá Filmshúsinum í samstarvi við Kringvarp Føroya og Søvn Landsins. Savnsuppgávan er týdningarmikil uppgáva, sum loysn eigur at finnast uppá sum skjótast. Endamálið er tvíbýtt. Eitt er sjálv varðveitingin, sum fer fram gjøgnum avhendingarskylduna til Landsbókasavnið eftir lóg og kunngerð um

bókasøvn, annað er at gera filmssavnið tøkt fyri almenninginum. Hetta eru uppgávur, sum eiga at verða lýstar serstakt.

## Bygnaður

Mælt verður til at skipa Filmshús við sjálvstøðugari játtan á fíggjarlógini á § 13 hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum. Stýri fyri Filmshúsið verður sett. Uttanríkis- og vinnumálaráðið, Mentamálaráðið og Felagið Føroysk Filmsfólk velja eitt umboð í part.

Stýrið fyri Filmshúsið setir dagligan leiðara, sum vísir til stýrið. Dagligi leiðarin setir onnur starvsfólk.

Í fyrstu atløgu virkar Filmshúsið sambært reglugerð, sí s. 9.

Filmshúsið skal borga fyri framhaldi og menning av filmsvinnuni. Filmshúsið er tættasti samstarvsfelagi hjá áhugafeløgunum í føroysku filmsvinnuni, og tað er tí eisini umráðandi at varðveita sambandið til grasrøturnar. Samstundis er neyðugt at tryggja samanhang við aðrar skipanir, sum filmshúsið liggur tætt uppat fyri at skapa samvirkni og at tálma rakstrarúrtreiðslunum. Tað eigur t.d. at bera til hjá landinum at leggja uppgávur hjá Filmshúsinum saman við líknandi uppgávum fyri eitt nú tónleik, gastronomi, design og arkitektur í einum nýskapanardepli, eins og mælt verður til í politikkinum fyri skapandi vinnur. Um nýskapanardepilin verður skipaður undir Uttanríkis- og vinnumálaráðum, verður mælt til, at verandi umsiting í Vinnuframa verður víðkað til at veita tænastur til allar samstarvspartar í deplinum. Tí verður eisini mælt til, at Filmshúsið frá byrjan savnar sína orku um tær filmsfakligu uppgávurnar og samstarvar við Vinnuframa um umsitingina.

## Manning og umsitingarligar raðfestingar

Mælt verður til at seta eitt fulltíðarstarv fyrsta árið. Starvsfólkið skal í tøttum samstarvi við filmsumhvørvið fyrstu árini leggja høvuðsdentin á innlendis menningina, at menna filmsførleikar og at styrkja filmsumhvørvið í Føroyum.

Sum frá líður, fer Filmshúsið í størri mun at virka fyri altjóða marknaðarføring og netverkan. Ein framtíðarmynd kundi verið, at umleið helvtin av orkuni verður brúkt til innlendis menning og helvtin til altjóða marknaðarføring og netverkan.

Fólkið, ið kemur at stjórna Filmshúsinum, má vera ein savnandi eldsál við sterkum samskiftisførleika og góðum fyrisitingarligum evnum. Leiðarin má vera væl vitandi um filmsframleiðslu, duga at ráðgeva filmsumhvørvinum um bæði tøkni, fígging og framleiðslu, megna at geva heilt ítøkiliga og skjóta hjálp á øllum viðkomandi økjum og skipa fyri førleikamenning í filmsgerð.

Samstundis má leiðarin eisini duga at hevja seg uppfrá, marknaðarføra Føroyar sum filmland eins væl og einstakar filmar og at ráðgeva politisku myndugleikunum í filmslistarligum og –vinnuligum spurningum.

# Staðseting og hølistørvur

Bæði í álitinum frá Klippfisk og í samrøðunum, sum bólkurin hevur havt við áhugapartar í filmsvinnuni, verður stórur dentur lagdur á, at Filmshúsið verður staðsett í miðdeplinum fyri filmsumhvørvinum, helst í miðbýnum í Havn.

Arbeitt verður fram ímóti at staðseta Filmshúsið saman við filmsverkstaðnum Klippfisk og at skipa umsitingarligt samstarv við eitt nú Vinnuframa. Hølistørvurin hjá Filmshúsinum sjálvum verður tí avmarkaður til eina skrivstovu umframt atgongd til fundarhøli og aðrar felags umstøður hjá Klippfisk.

Tætt samstarv verður somuleiðis við aðrar skipanir og stovnar, sum arbeiða við og stuðla mentan og filmsframleiðslu m.a. Hugskotinum hjá Tórshavnar kommunu, Íverksetarahúsinum, Mentamálaráðnum, Kringvarpinum, Søvnum Landsins og Fróðskaparsetrinum.

Størsta samvirknið og skynsamasti raksturin fáast, um fleiri skipanir og fyritøkur, ið hava líknandi endamál, kunnu verða staðsett saman, og mælt verður tí til, at arbeiðið við einum tvørfakligum nýskapanardepli, ella møguliga depli einans fyri skapandi vinnur, heldur fram.

# Fíggjarætlan

Útgangsstøðið verður tikið í kostnaðarmetingini í álitinum um Filmshús frá 2015, men verður lagað til politisku ætlanina um at seta av 1 mió. kr. til Filmshús í 2017:

**Fíggjarætlan 2017 - roknað verður við, at leiðarin kann byrja í apríl**

| | |
|---|---:|
| Lønir (leiðari) | 450.000 |
| Hølisleiga | 80.000 |
| Kontórútreiðslur/heimasíða/vask o.a. | 80.000 |
| Førleikamenning (skeið og skúli) | 100.000 |
| Altjóða límaskapir | 50.000 |
| Søluátøk, prentlutir og umboðan | 125.000 |
| Umsiting | 100.000 |
| Nevnd (fundarpeningur) | 15.000 |
| **Í alt** | **1.000.000** |

**Fígging næstu árini**

Fíggjartørvurin komandi árini fer at vaksa. Tørvur verður á fígging til skeiðsvirksemi og við størri játtan til altjóða límaskapir. Mett verður, at upprunaliga metingini á 1,63 mió. um árið røkkur tey næstu árini.

**Fíggjarætlan 2018**

| **Filmshúsið útreiðslur** | |
|---|---|
| Lønir (leiðari og starvsfólk) | 900.000 |
| Hølisleiga | 80.000 |
| Kontórútreiðslur/heimasíða/vask o.a. | 90.000 |
| Skeið og skúli | 100.000 |
| Altjóða limaskapir | 100.000 |
| Søluátøk, prentlutir og umboðan | 150.000 |
| Umsiting | 180.000 |
| Nevnd (vanligur fundarpeningur) | 30.000 |
| **Í alt** | **1.630.000** |

# Uppskot til tekst til fíggjarlógaruppskotið 2017

Filmshús verður sett á stovn, sum skal leggja lunnar undir sprettandi føroysku filmsvinnuna. Filmshúsið skal vera ein savnandi depil fyri filmsumhvørvið, ráðgeva filmsvinnuni, skipa fyri skeiðum, marknaðarføra føroyskan film uttanlands og vera við til at marknaðarføra Føroyar sum filmsland.

Filmshúsið er eisini ætlað at verða fakligur ráðgevi og metari til umsóknir frá útlendskum framleiðslufeløgum um afturbering av útreiðslum av at taka upp film í Føroyum.

Í 2017 eru játtaðar 1 mió. kr. til Filmshúsið. Roknað verður við, at fíggjartørvurin verður vaksandi komandi árini orsakað av vaksandi filmsvirksemi, og mælt verður til, at játtanin næstu árini verður 1,63 mió., eins og mett í upprunaligu kostnaðarætlanini.

(Uppskot til)

**Reglugerð**

**fyri**

**Filmshúsið**

## 1. Endamál

**§ 1.** Filmshúsið hevur til endamáls at gróðurseta film sum vinnu, harundir at

a) styrkja filmsumhvørvið í Føroyum og
b) menna filmsførleikar.

## 2. Skipan

**§ 2.** Filmshúsið verður skipað við stýri. Stýrið
1) setir leiðaran,
2) hevur yvirskipaðu leiðsluna av Filmshúsinum,
*3)* skal viðvirka til at nøra um filmsumhvørvið í Føroyum og stuðla útbreiðslu uttanlands,
*4)* skal virka fyri, at ein filmsvinna fer at virka í Føroyum.

*Stk. 2.* Stýrið hevur fund í minsta lagi tvær ferðir um árið og annars eftir tørvi.

*Stk. 3.* Stýrið velur formann og næstformann. Dagligi leiðarin fyri Filmshúsið er skrivari hjá stýrinum.

## 3. Uppgávur

**§1.** Filmshúsið skal vera ein savnandi depil og røkja uppgávur, sum birta uppundir film sum vinnu, harundir
a) ráðgeva og leiðbeina føroyskum filmsfólkum,
b) marknaðarføra føroyskan film uttanlands,
c) marknaðarføra Føroyar sum filmsland,
d) umsita umsóknir um afturbering fyri filmsframleiðslur,
e) svara fyrispurningum innlendis og uttanifrá,
f) vera til hjálpar í sambandi við filmsframleiðsur,
g) miðla samband millum filmsaktørar,
h) samstarva við viðkomandi partar um filmssavn,
i) skipa fyri førleikamenning, harundir skúla og skeiðum,
j) savna og miðla vitan um film,
k) samstarva við filmsumhvørvið, myndugleikar o.o., so tryggjað verður, at vitan og førleikar verða gagnnýtt til fulnar.

## 4. Fígging og umsiting

§ **2.** Filmshúsið hevur játtan á fíggjarlógini.
*Stk. 2.* Játtanin fevnir um rakstur av filmshúsinum og virkseminum.
*Stk. 3.* Filmshúsið kann samstarva við viðkomandi partar um m.a. felags umsiting, marknaðarføring, førleikamenning o.a.
*Stk. 4.* Filmshúsið letur inn roknskap fyri virksemið eftir lokið fíggjarár.

## 5. Gildiskoma

§ **4.** Henda reglugerð kemur í gildi xxx

## Íslendsku royndirnar

"Hollywood can vanish – think culture!". Hesi orðini átti Hilmar Sigurdsson, íslendskur filmsframleiðari og fyrrverandi formaður í felagnum fyri íslendskar filmsframleiðarar, SÍK. Hann legði dent á, at filmur skal gerast fyri filmsins skuld, og at man eigur at vera trúgvur móti sær sjálvum. Tað er júst íslendska søgan, ið er áhugaverd, uttan veruligu ella autentisku søguna var grundarlagið veikari fyri at gera íslendskan film.

Í íslendska mentamálaráðnum varð dentur eisini lagdur á, at filmur er mentan. Íslendingar hava eina lóg um film (Kvikmyndalög nr. 137 frá 21. desember 2001), og har eru ásetingar um m.a. stuðul, savn og Kvikmyndamiðstöð Íslands (Icelandic Film Centre). Eisini er í lógini ásett, at eitt filmsráð skipað við 7 limum hevur til uppgávu at ráðgeva myndugleikunum í filmsspurningum. Harumframt er ein breiða avtala ella semja gjørd millum mentamálaráðið, fíggjarmálaráðið, íslendskar filmsframleiðarar, íslendsk filmsfólk og leikstjórafelagið um filmsgerð og filmsmenning 2012-2015, og ein nýggj semja verður gjørd í løtuni (var ikki liðug í juni).

Sambært íslendsku filmslógini er tað Kvikmyndamiðstöð Íslands (Icelandic Film Centre), sum hevur játtanina til filmsgrunnin undir hond. Í filmssentrinum var sagt, at íslendskur filmur fyrst og fremst er "mentanarlig sjálvverja", síðan kemur alt annað. Royndirnar í Íslandi vísa, at stuðul er neyðugur fyri, at filmslistin kann mennast. Brádligi filmsvøksturin í Íslandi verður settur beinleiðis í sambandi við øktu játtanirnar í íslendska filmsgrunninum.

Kvikmyndamiðstöð Íslands húsast saman við biografinum Bió Paradís, sum skapar synergi millum filmsumhvørvið, áskoðararnar o.s.fr. Bió Paradís er fyrsti óhefti "art-house" biografur í Íslandi, sum vísir listarfilmar, heimildarfilmar, stuttfilmar, animatiónsfilmar og eksperimenterandi filmar umframt undirvísingarfilmar fyri børnum.

Bió Paradís leggur høvuðsdentin á íslendskar filmar, bæði eldri og nýggjari. Biografurin hýsir árliga Reykjavíkar altjóða filmsfestivali og fleiri øðrum minni festivalum sum t.d. Reykjavíkar stuttfilmsfestivali, heimildarfilmsfestivali o.ø. Í biografinum er eisini kafé og handil við filmsknýttum lutum.

Ísland hevur afturberingarskipan til filmsframleiðslur, ið eru ætlaðar altjóða marknaðinum, og hendan skipanin hevur nógv at siga fyri útlendskar framleiðslur. Afturberingarskipanin liggur undir nýskapanar- og vinnumálaráðnum, og verður marknaðarførd av filmsumboðsmanninum hjá Film in Iceland, ið er partur av Invest in Iceland. Umsóknir verða tó sendar til Nýskapanar- og vinnumálaráðið, og tað er Icelandic Film Centre, ið hevur sjálva viðgerðina av umsóknunum um hendur. Filmskommisserurin ella umboðsmaðurin samstarvar nógv við framleiðslufeløgini í Íslandi, luttekur á filmsmessum, skapar netverk og sambond og setir í verk tiltøk, ið eggja útlendskum framleiðarum til at velja Ísland (incentives). Tað snýr seg um røttu brandingina. Íslendsku feløgini, siga tey, eru fødd "global", tí heimligi marknaðurin er so lítil.